# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Johan er ein spælari, sum kann røkja øll pláss í verjupartinum*
*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari*

# Verjan var spurningurin




*Tað vóru tveir áleyparar, sum sótu undir liðini á Jógvani Martin, tá landsliðið varð úttikið. Men tað var nú verjuparturin, sum landsliðsvenjarin hevur hugsað mest um undan úttøkuni*

**Við leikbanni til Óla Johannesen, avboð frá Marna Djurhuus og linligum avrikum frá Mortan úr Hørg og Rasmus Nolsøe var tað verjuparturin, sum gav Jógvani Martin Olsen største høvuðbrýggið undan landsliðsúttøkuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Landsliðshópurin til Litavadystin telur bara fimm verjuspælarar, og tað er nakað væl minni, enn tað vanliga er. Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, duldi heldur ikki fyri, at hetta var tann parturin av liðnum, sum hann hevur hugsað mest um, nú hópurin skuldi setast saman.

- Óli Johannesen er leikbannaður, so tað gevur seg sjálvt, at hann ikki er við. Hartil hevur Marni Djurhuus givið avboð av persónligum ávum, og tað er ein dyggur smeitur. Hann er ein spælari við einum høgum botnstøði, og sum altíð leverar vøruna á vøllinum. Taka vit so hinar, sum hava verið í myndini, so hava bæði Mortan og Rasmus havt eina down-periodu í HB, har teir partvíst hava mist sítt pláss á liðnum. Tað er sjálvandi ikki nøktandi hjá teimum og HB, og tað er enn minni nøktandi hjá landsliðnum, segði Jógvan Martin Olsen.

Ístaðin eru Herbert í Lon Jacobsen og Johan Troest Davidsen tiknir við í hópin.

- Herbert hevur spælt væl fyri B36. Og hann er vanur at spæla saman við Fróða og Jákupi, so har eru fleiri lutir, sum tala til hansara fyrimun. Og Johan er ein spælari, sum kann røkja øll pláss í verjupartinum. Hann er kropsliga væl fyri, og eisini í luftspælinum er hann sterkur, so hann er heilt víst ein spælari, sum vit hava havt eitt vakið eyga við, segði Jógvan Martin.

Johan er annars eisini tikin út til U21-landsliðið, sum spælir móti Italia tann 8. september. U21-ferðalagið verður aftur í Føroyum leygarkvøld, og sunnudag skal hann so av landinum aftur við A-landsliðnum.

Umframt teir fimm í verjupartinum eru tó eisini aðrir møguleikar. Bæði Christian Høgni Jacobsen og Jákup á Borg hava nevnliga áður røkt bakk-pláss á landsliðnum, og tað er væl hugsandi, at hetta eisini verður støðan í Litava um tvær vikur.

## Hópurin

**Málverjar**
**Jákup Mikkelsen, B36**
**Rene Tórgarð, EB/S**

**Verjuspælarar**
**Atli Danielsen, Frem**
**Herbert í Lon Jacobsen, B36**
**Johan Troest Davidsen, NSÍ**
**Jón Rói Jacobsen, AaB**
**Fróði Benjaminsen, B36**

**Miðvallarar**
**Súni Olsen, AaB**
**Mikkjal Thomassen, B36**
**Hans Pauli Samuelsen, EB/S**
**Jákup á Borg, HB**
**Símun Samuelsen, Keflavík**
**Pauli G. Hansen, Skála**
**Hjalgrím Elttør, NSÍ**

**Áleyparar**
**Christian Høgni Jacobsen, NSÍ**
**Andrew av Fløtum, HB**
**Rógvi Jacobsen, HB**
**Christian Lamhauge Holst, Lyngby**

# Finalan vigaði nógv

**At Rene Tórgarð og Hans Pauli Samuelsen aftur eru í landsliðshitanum, skal ivaleyst síggjast í ljósinum av avrikunum hjá teimum í steypafinaluni**

FÓTBÓLTUR
*jakup@sosialurin.fo*

Hjá Rene Tórgarð er talan um fyrstu landsliðsúttøkuna yvirhøvur. Hansara navn hevur verið nevnt áður sum ein møguleiki, men seinast tóktist landsliðsvenjarin geva til kennar, at hann heldur vildi hava Meinhardt Joensen hjá KÍ.

Ársins málverji í fjør var tó ein av avgjørdu lyklaspælarunum hjá EB/Streymi, tá teir vunnu finaludystin um løgmanssteypið, og ivaleyst hevur hetta vigað nógv, tá endaligi hópurin er tikin út. Nakað sum eisini sæst aftur í, at Hans Pauli Samuelsen aftur er í landsliðshitanum, meðan Mortan úr Hørg og Rasmus Nolsøe fyri eina tíð eru í kuldanum.

- Tað er ikki so, at ein dystur ger av, hvussu úttøkan er. Rene hevur støðugt verið í myndini, og hesa ferð hava vit so valt at geva honum møguleikan. Eisini tí hann við hesum veruliga fær høvið at vísa okkum, hvør dugur er í honum. Hans Pauli hevur áður verið í myndini, men seinast segði eg, at hansara avrik hava sveiggjað ov nógv. Seinastu tíðina hevur hann tó avgjørt víst betri støði, og tí haldi eg, at valið av honum er náttúrligt.

- Hartil skal eisini hugsast um, at miðvøllurin í aðrar mátar er skerdur. Sámal Joensen hevur verið nógv skaddur, og tað sama má sigast um Inga Højsted, so teir báðir eru ikki við. Bergur Midjord hevur somuleiðis verið nógv skaddur, og Hanus Thorleifsson hevur ikki víst sama støði í ár, sum hann áður hevur gjørt. Og tí er eingin ivi um, at Hans Pauli í løtuni er besta alternativið til eitt pláss á kantunum, segði Jógvan Martin Olsen.